# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# EIN ER TÍÐIN AT DANSA...

**Ein stubbi og hugleiðing frá Eysturoyar Dansifelag, nú dansiveturin er av.**



*Børn í dansi í Hæddini*

*mynd Jens Dalsgaard*

"Ein er tíðin at dansa " var fast tiltak hjá Kem-bónda í Lamba – tað verið seg í álvara ella í gaman. Vit hóma tilsipingar til Prædikarin í Halgubók, um at "alt hevur sína tíð". Tiltakið kemur eisini fyri í føroysku brúðarvísuni, 21.ørindi: "Sum Salomon segði, skal tíð til alt, og ein er tíðin at dansa"...

Dansitíðin við føroyskum dansi er av, nú føstan er ein veruleiki. Eftir gomlum siði, steðga eisini tey ymsu dansifeløgini sínum virksemi í tíðini uppundir kristnu páskahátíðina.

Hvussu royndist so dansiveturin 2006-2007? Sum skilst merkja flestu feløg framgongd, nøkur onga broyting og í onkrum føri afturgongd. Eysturoyar Dansifelag hevur ein vaksandi limaskara og samstundis eina vaksandi luttøku tey einstøku dansikvøldini, sum eru fríggjakvøld. Eitt sera týðandi virksemi hjá dansifeløgunum er, at vitja onnur feløg, ella at fáa vitjan sjálvi. Hetta gevur dansinum eina eyka megi og fjølbroytni. Altíð forvitnisligt at uppliva aðrar skipanir, aðrar vísur ella onnur kvæði, ja kanska eitt heldur øðrvísi dansilag.

Herfyri var Eysturoyar Dansifelag sína árligu vitjan í Funningi. Hesaferð saman við Norðstreymoyar Dansifelag. Hoyrdi gamlan mann har í bygdini siga, at hann hevði ikki uppliva so góðan føroyskan dans har í bygdini, síðan hann var heilt ungur. Ein onnur góð dansiferð var í Haraldssundi, har eisini Klaksvíkar Dansifelag vitjaði. Tað merkist væl, at Norðoyartunnilin, ger eitt heilt annað samstarv møguligt á dansiøkinum. Ongin ivi er um, at hetta fer at fáa avgerandi týdning fyri økt dansivirksemi í komandi tíðum.

Nú føstulávintsdansurin er av, ber til at líta afturá ein farnan dansivetur. Í mínum hugaheimi var kanska besta upplivingin vitjanin á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, fríggjakvøldið uppundir føstulávint. Felagið varð boðið at vitja við at dansa í ein tíma fyri búfólkunum har. Innbjóðingin fevndi eisini um børn úr 4. flokki av Toftum, við Jóhonnu Petersen á odda. Børnini framførdu fyrst. "Øskudølgur og sópingarkona", "Tá eg verði stórur" og "Stat op Sankta Simeon ", ið alt samalt týðuliga nam við búfólkini. Fleiri av teimum komu uppí. Onnur sótu og vaggaðu í stólum og rullistólum. Øll tóku so saman bæði styttri og longri vísur: "Jákupsa Skegg", "Mallebro" og "Grindavísuna". Ein hugtakandi løta, har trý ættarlið vóru á gólvi saman. Børnini – ið skulu bera dansin víðari – tey miðaldrandi í dansifelagnum og so tey búfólkini, ið mestsum hava lagt frá sær, men framvegis hava mentanararvin í huganum. Somu fólk, ið hava borið dansin víðari til okkum, ið enn orka at treða dansin. Seinni um kvøldið komu eisini nøkur børn við í Hæddina, har Eysturoyar Dansifelag heldur til.Vit tóku ymiskt, ið tey høvdu lært í skúlanum: "Veturin kom við kulda og kava" , "Kall og Svein Ungi", "Mær gav Sankti Mortan" og annað. Ung og eldri saman. Hvat kann verða betri. Jú, hesar báðar kvøldarløtur á Ellisheiminum og í Hæddini mintu okkum øll á, at "ein er tíðin at dansa".




# Metlágt arbeiðsloysi í januar

**Arbeiðloysið fyri januar 2007 er uppgjørt til 587 fulltíðararbeiðsleys. Hetta er sera lágt og svarar til 2,1% av arbeiðsfjøldini, og er tað sama talið, ið varð uppgjørt fyri desember 2006, sigur Hagstovan**

SAMFELAG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*







Flestu ár fer arbeiðsloysið nakað upp um ársskiftið. Hetta hendi tó ikki í ár, og tí vísir tað árstíðarjavnaða talið fyri januar 2,0%. Tað er higartil lægsta arbeiðsloysið, sum er uppgjørt. Hóast býtið ikki er púra javnt millum landslutirnar og heldur ikki millum aldursbólkar og kyn, er arbeiðsloysið kortini yvirhøvur lágt í øllum bólkum.

## Eldri konufólk

Í alders- og kynsflokkingini er bert ein bólkur at finna, sum fer upp um 4%. Tað eru konufólk eldri enn 55 ár, har arbeiðsloysið er 4,8%. Arbeiðsloysið millum tey ungu undir 25 ár er uppgjørt til 1,3% og er hetta lágt at vísa seg, men neyvan tann veruliga myndin. Av tí at hesi arbeiðsloysishagtølini verða fingin úr skráunum hjá ALS og Almannastovuni, síggja vit bert tey, sum eru skrásett har. Hjá ungum arbeiðsleysum er trupulleikin ofta tann, at tey ikki áður hava havt eitt arbeiði, sum møguligt útgjald kann roknast eftir. Harumframt er hetta eisini aldursbólkurin, har nógv eru í útbúgving, og sambært reglunum hjá ALS verða tey tá vanliga ikki mett at vera tøk á arbeiðsmarknaðinum og hava tískil heldur ikki rætt til stuðul.

## Áhugavert í Sandoy

Í sýslu- og kynsflokkingini eru tveir bólkar, ið koma upp um 4%: konufólk í Norðuroyggjum og í Suðuroy, har arbeiðsloysisprosentini eru ávikavist 4,3% og 5,7%. Í Sandoyar sýslu er tað áhuvaverda hent, at arbeiðsloysið millum konufólk er farið heilt niður á botn og er munin lægri enn hjá mannfólkunum. Tølini her eru tó so smá, at tað skal ógvuliga lítið til at broyta myndina nógv, sigur Hagstovan á heimasíðuni hjá stovnum.